## Hús til sølu



Vegna eitt av viðskiftafólkum okkara selja vit sethúsaognina á Gripsvegi 10. Grundøkið er 290 m². Húsini eru í trimum hæddum. Í kjallaranum eru íbúð og fýrrúm. Á miðhæddini eru gangur, stova, køkur og baðiverilsi. Á loftinum eru 2 sovikømur og stór loftsstova.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jógvan E. Winther Poulsen, adv., jewp@jura.fo
Ringjast kann eisini 511692 ella 219822.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen , adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45

## Sethús á Kambsdali

Um hóskandi boð fæst, verða sethús á Kambsdali seld.

Eittplans hús, 160 m², bygd í 1986.

Húsini eru soleiðis innrættað: Stova, spísistova, køkur, hjúnarúm, 5 barnakømur, baðiverilsi, gongd, durur, fýrrúm, annað rúm og hjallur.

Um áhugi er, ring **tlf. 223192**

E|ROKNSKAPUR

Bókhald • Fíggjarætlan • Roknskapur
Skattur og sjálvuppgáva • Fyrisiting v.m.

E|Roknskapur Sp/f
Dvørgastígur 9 • 100 Tórshavn
Tel: 322 570 • Fax: 322 572 • Far: 212 570
info@e-roknskapur.fo
www.e-roknskapur.fo

GRINDAMANNAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 27. mars 2004 klokkan 14.00 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av einum nevndarlimi
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt.

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært pkt. 6, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er almennur og høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir í felagnum.

**Nevndin fyri »Grindamannafelagið«**
Fútalág 40 · 100 Tórshavn

## 7 persóna bilur til sølu



Ein sera væl hildin og væl útgjørdur Honda Stream 1,7 til sølu. Bilurin er frá nov. 2002 og hevur koyrt 17.000 km.

Prísur kr. 195.000. Nýprísur kr. 245.000.

**Tlf. 214321**

Nýggjar
**TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

## Felags foreldrafundur

Týskvøldið 2. mars kl. 19.00 verður felags foreldrafundur í høllini í Argja skúla. Evnið á fundinum verður:

**Samskifti**

**Marjun Holm** sigur nøkur orð um vanligt samskifti millum heim og skúla.

Síðani fer **Jógvan Friðriksson,** prestur at hugleiða við yvirskriftini:

**Etiskt samskifti – børn heim og skúli**

Boðið verður kaffi og tá er høvi til at seta spurningar.

**Argja skúli og Skúlastýrið**

## Kunngerð

Sagt skal verða frá at avlopsskattur fyri 2003, herundir avlopsskattur stavandi frá ikki nýttum barnafrádrátti, verður mótroknaður í veitingini hjá viðskiftafólkum, ið móttaka forsorgar- ella endurbúgvingarhjálp frá Almannastovuni.

Avlopsskatturin verður mótroknaður í veitingini fyri februar.

Um avlopsskatturin er hægri enn ein mánaðarveiting, verður yvirskotið flutt til næstu mánaðarnar.

**Almannastovan**

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Felagnum Tórshavn verður sunnudagin 21. mars 2004 kl. 16.00 á Hotel Hafnia.

Uppskot til mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 10. mars 2004.

Dagsskrá fyri ársaðalfundin verður send limum felagsins í brævi sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

**Felagið Tórshavn**
**Kunningstovan · postbox 379 · 110 Tórshavn**



## Haldarar hjá Sosialinum

ið ikki fáa leygardagsblaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

**Prentmiðstøðin**

Sosialurin



# Vikuskifti

Nr. 41 • leygardagur • 28. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


Sjálvsálit kann lærast

Samrøða við Dianu Borgnýardóttir, NLP-ráðgeva

Lesið síðu 4–5





*Karen Hardrup, hotellstjóri á Comwell í Kolding, við einum av málningunum eftir Kára Svensson*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Stór hotellketa satsar upp á føroyska list

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Hotell eru alt ov bangin fyri at stoyta nakran frá sær við tí, tey hanga upp á veggin. Vit vilja hava málningar, sum fylla alt rúmið og krúpa inn undir húðina á teimum vitjandi. Og til tað finnur tú neyvan nakað, ið hóskar betur enn málningarnir hjá Kára Svenssyni, sigur Preben Osmann, roknskaparleiðari á Comwellhotellinum í Kolding.

### Comwell og listin

Preben Osmann greiðir frá, at tað var mest sum av tilvild, at hann fekk eyguni upp fyri listini hjá Kára Svenssyni. Eg var stokkin inn á gólvið á Galleri Rasmus í Odense, ið júst tá hevði eina framsýning við eini 50 málningum hjá Kára. Eg gjørdist so hugtikin, at eg beinanvegin fekk eina avtalu í lag um, at framsýningin skuldi halda fram á Comwellhotellinum í Kolding. Ikki bara tí at eg helt málningarnar vera ótrúliga hugtakandi, men eisini tí teir vóru so stórfingnir, at eg alt fyri eitt sá fyri mær, at okkara hølir vóru sum skapt til teir.

List hevur altíð spælt ein stóran leiklut í innrættingini av Comwellhotellunum í Danmark, ið eru liðir í stórari hotelketu, sum fevnir um alt Skandinavia. Í 1986 fingu tey hjálp frá kenda danska listamanninum Per Arnoldi at innrætta hotellið í Kolding, og listarliga fingramerkið smæðist ikki burtur. Hølini eru stór og ljós og veggirnir hava fingið teir eyðkendu reyðu, gulu og bláu Arnoldi litirnir.

### Føroysk mentanarvika

– Tá avtalan um framsýningina var komin uppá pláss, settu vit okkum í samband við Kára Svensson. Onkur hevði nevniliga frætt, at Kári er ein framúr góður frásøgumaður, so hví ikki fáa hann til Kolding at greiða frá føroyskari list á einum serligum føroyskum listakvøldi? Og áðrenn vit vistu av, hevði hugskotið um tað eina listakvøldið ment seg til eina heila føroyska mentanarviku, har okkara gestir fingu høvi at royna alt frá røstum fiski til skerpikjøt, sum Kári sjálvur skaffaði okkum. Eg má viðganga, at eg ikki hevði væntað tað. Men føroyska sjálvtøkuborðið gjørdist so vælumtókt, at kokkarnir illa fingu fylgt við. Minnist meg rætt, ótu einir 80 gestir á matstovuni hvørt kvøld ta vikuna, og tað er væl meir enn vanligt, greiðir Preben frá.

### Eisini á matarlepanum.

– Ert tú fyrst vorðin bitin av málningunum hjá Kára, fært tú ikki slept teimum aftur, heldur Preben fram. Eftir framsýningina keyptu vit fýra av málningunum, sum nú hanga og prýða veggirnar í matstovuni. Men eg eri ikki tann einasti, sum eri hugtikin, tí eftir reaktiónunum at døma kundi eg havt selt teir allar minst 50 ferðir, sigur Preben. Men øll eru vælkomin inn á gólvið at hyggja. Og skuldu tey fingið hug til ein góðan bita, kunnu tey gleða seg til matarseðilin, sum eisini er prýddur við myndum hjá Kára.

### Skipaður ørskapur

– Hesir ekspressionistisku málningarnir hava eina villa megi, sum nærum fær motiv og litir at toyggja seg út úr myndini og draga teg við sær inn í hana aftur, hugleiðir Preben. Tað er lætt at skilja, hví so nógv føroysk listafólk fáa íblástur úr náttúruni. Men tað ber ikki til at eftirlíkna kenslurnar, ein føroyingur málar inn í eina náttúrumynd. Eg kenni onkur donsk listafólk, sum javnan ferðast til Føroyar fyri at mála. Og tey koma eisini aftur við vøkrum myndum, ongin ivi um tað, men ein vøkur mynd er also ikki tað sama, sum eitt listaverk.

Ein føroyingur sum Kári Svensson málar ikki myndir av náttúruni. Hann málar vind, luktir og ljóð inn í myndina, so at hon verður ein persónlig tulking av einum ávísum náttúruhuglagi. Og eri eri sanførdur um, at fyri at kunna merkja náttúruna á ein slíkan hátt, mást tú vera uppvaksin við henni. Tað er hendan kenslan, sum gevur føroysku listini tann heilt serliga skipaða ørskapin, vit kenna so væl frá Ingálvi av Reyni og Tróndi Paturssyni, men sum ikki sær minni spennandi út hjá tí yngra ættarliðnum.

So hvør veit - kanska verða tað málningar hjá onkrum av teimum, sum fara at prýða veggirnar á Comwellhotellinum í Kolding í framtíðini, sigur listaáhugaði roknskaparleiðarin at enda.